

– Myndirnar lýsa tað villa í fólkinum, tá ið tey fara í grind, sigur Regin W. Dalsgaard.

MYND: JENS KRISTIAN VANG

# 2 minuttir við blóði og drápi

– EG **DRØNAÐI** ÚT VIÐ **MYNDATÓLINUM** OG TÓK EINA **RÚGVU** AV **MYNDUM**. EG HUGSAÐI **IKKI** UM, AT TAÐ SKULDI **BLÍVA** TIL EINA **FRAMSÝNING**, SIGUR **REGIN W. DALSGAARD**. HANN HEVUR **KOMANDI** DAGARNAR **MYNDAFRAMSÝNING** VIÐ **GRINDADRÁPI** SUM EVNI



**GRINDADRÁP**

**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Regin W. Dalsgaard letur í dag upp fotoframsýning ,sum hann kallast »2 minuttir«.

Framsýningin er í Smiðjuni í Lítluvík, og evnið er grindadrápið í Sandagerði í juli í fjør.

Hetta er fyrsta framsýningin hjá Regini, sum hevur tikið myndir í nógv ár. Motivini hava serliga verið tónleikarar og portrett, men hann hevur eisini tikið náttúrumyndir. Regin vann seinasta ár virðislønina Merit Award á New York Institute of Photography.

### Leyp í grindadráp

Tað var ein summarmorgun í fjør, at Regin W. Dalsgaard tók myndirnar, sum nú verða sýndar fram. Drápið var klokkan átta um morgunin.

– Eg drønaðu út við myndatólinum og tók eina rúgvu av myndum. Eg hugsaði ikki um, at tað skuldi blíva til eina framsýning, men aftaná er hugskotið komið, og nú er tað veruleiki, sigur Regin W. Dalsgaard.

– Myndirnar lýsa tað villa í fólkinum, tá ið tey fara í grind. Myndirnar vísa fólkini í grindadrápinum – vreiðina, samskipanina, samanspælið millum menninar og drápið sjálvt, sigur hann.

Myndirnar hava fingið íblástur frá stórfilmunum Braveheart og 300.

18 myndir eru á framsýningini, sum letur upp í dag og hevur opið fram til mikudagin.

Regin W. Dalsgaard vónar, at myndir seinni kunnu útstillast uttanlands, og hann arbeiðir í løtuni við at fáa myndirnar inn á eitt gallarí mitt í Paris.

## KLUMMAN



Rólant Waag Dam

# Product placement í Dagur og Viku

Flaggskipið hjá Kringvarpinum, Dagur og Vika, er eftir øllum at døma farið at renna tíðindi fyri donsku sjónvarpsrásina TV2. Í sjónvarpstíðindasendingini týskvøldið, valdi Kringvarpi at lýsa fyri sjónvarpssending á TV2. Frammanfyri vertin í Degi og Viku, høvdu tey stóð eitt stórt krúss, ið var prýtt við búmerkinum hjá sjónvarpssendingini Natholdet.

Kringvarpsfólkini gjørdu sær enn tá so stóran ómak, at tey fluttu krússið gjøgnum sendingina, soleiðis at tað stóð perfekt fyri teir 23 minuttirnar sendingin tók.

Natholdet er skemtisending. Eitt satiruprogramm, sum ger gjøldur burtur úr smátingum í donsku fjølðmiðlunum. Onkur vildi sagt, at talan var um danskt pjatt! Men tað er hesum, Kringvarpið velur at reklamera fyri í allarbestu senditíð. Hví ger Kringvarpið tað, spyrji eg? Og hvat fær Kringvarpið afturfyri? Og fer Kringvarpið at gera tað aftur, um vit í Miðlahúsinum, Dimmalætting ella Norðlýsið senda eitt líknandi krúss til Kringvarpið.

Fyrsta svarið kom mikukvøldið. Tá var Kringvarpið so heppið at sleppa í Natholdet. Brot úr Degi og Viku rullaðu yvir danska skíggjan, meðan fyrrverandi pornastjørnan Kira Eggers og verturin Anders Breinholdt so sótu og flentu eftir Føroyum og føroyingum, samstundis sum tey borðreiddu við vanligu fordómunum um grindadráp, samkynd og sterka trúarlívið í Føroyum.

Eg bíði spentur eftir hinum svarunum. Ikki minst, um Kringvarpið fer at seta eitt krúss frá Miðlahúsinum, Dimmalætting ella Norðlýsinum í eina av næstu sendingunum. Nær fær onkur av hesum miðlunum eina lýsing í Degi og Viku? Ella verður næsta fetið hjá Degi og Viku veruligt product placement? At ymsu vertirnir altíð eru klæddir í troyggjur frá Guðrun&Guðrun, at tað stendur ein sodavatn frá Føroya Bjór á borðinum undir hvørjari tíðindasending og at stóru skermarnir aftanfyri vertin verða skiftir út við lýsingar frá MBM og Atlantic Airways?

Alment fíggjaða Kringvarpið fær jú eina rúgvu av lýsingarpengum frammanundan. Hví so ikki ganga plankan heilt út og innføra product placement í tíðindasendingarnar eisini?



## INNIHALD

2 KLUMMA: PRODUCT PLACEMENT Í DAGUR OG VIKU
4 INTERVIEW: SARAH FRÁ X FACTOR
6 TIPS: PREI TIL HEIMIÐ
8 90 SEKUND: KRISTINA HÁFOSS
10 BAKGRUND: MICHELIN STJØRNUR
12 TAÐ ER TÍÐIN: TØKNI, HEILSA OG TÓNLEIKUR
14 Í RANGASTRÚPAN: YMISKT ÚR MIÐLUNUM
14 UMAFTURAFTURUM: HØGNI DJURHUUS
16 MAKEOVER: BÓNDIN Í SUMBA
18 TIL ARBEIÐIS: MARITA REYNHEIM DANIELSEN
24 BAKGRUND: VILJA VERJA FØROYSKT MEN SAKNA NÚTÍÐARGERÐ
26 KAPPINGAR: VINN GÓÐAR VINNINGAR
28 MIÐLAMJARR: TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM
31 TAÐ HENDIR: KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ
32 VIKUMYNDIN: PÁSKAEGG

VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Sarah / DR